# Systrarnar trív

**Næstu ferð:**
**Pál og Klæmint Weihe**

Virknu karrierusystrarnar Rúna og
stórum avbjóðingum og nógvari ábyrg
tær eru samdar um, at føroyskar kvin
kann leil

## Rúna Hilduberg

**Uttan at hava verið í tí stóra almenna polemikkinum hevur hon handan leiktjøldini roynt tað mesta. Við tveimum útbúgvingum í skjáttuni hevur hon verið sjálvstøðugt vinnurekandi bygningsverkfrøðingur, deildarstjóri á Mentamálaráðnum og undirvísari á Studentaskúlanum í Havn, og seinastu tvey árini hevur hon verið stjóri á Granskingarráðnum.**
**Rúna Hilduberg sigur, at drívmegin er at fáa ávirkan. Hon stílar høgt, hon vil hava ábyrgd, og hon metir, at kvinnur eiga ikki at halda seg aftur, sum tær í ov stóran mun hava lyndi til.**



SAMRØÐA
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

*Hvussu kunnu tit yvirornað lýsa tykkum sjálvar?*

**Mathea:** Eg eri innovativ og vil hava nakað at henda her og nú. Mær dámar væl at kasta meg út í nýggjar uppgávur og royna nýggjar leiðir. Eg eri ótolin, sum eg eisini kann nýta til nakað positivt, tí í privatu vinnuni, har eg í størstan mun havi starvast, eru ikki stundir til at drála. Spælireglurnar í privatu vinnuni avmynda sostatt í stóran mun mína náttúru, har arbeiðið skal ganga skjótt, og har tað ræður um at koma við nýggjum initiativum.

Í mínum privatlívi eri eg ruddilig, eg eri spontan, og mær nýtist tí ikki at leggja alt til rættis, tá eg fari í holt við nakað. Eg taki tað meiri, sum tað kemur. Um eg t.d. fái hug til at flyta eina hurð heima við hús, so geri eg tað uttan at drála.

**Rúna:** Eg eri eins og Mathea ótolin, við tað at eg vil hava nakað at henda her og nú, men mótvegis henni havi eg í størri mun starvast í almenna sektorinum og tillagað meg til tað umhvørvið. Munurin er, at í tí almenna má ein góðtaka, at framstigini eru ikki eins sjónlig og úrslitini meira kompleks. Tú ert partur av eini størri heild, eini langsiktaðari ætlan og eini drúgvari prosess samanborið við privatu vinnuna. Arbeiðið í almenna sektorinum er í stóran mun tengt at politiska viljanum, og tað ger arbeiðið spennandi og avbjóðandi.

Eg trívist, tá eg havi stóra ábyrgd, og einki kann samanberast við kensluna, tá ein sær, at arbeiðið gevur úrslit og eydnast.

### Bestu vinir

*Hvussu kunnu tit lýsa hvønn annan?*

**Mathea:** Rúna hevur sera góðar eginleikar at leggja tað til rættis, hon fer í holt við. Hon er støðufløst, hon er ikki eins spontan og eg, og so má eg eisini siga um mína stórusystir, at hon mangan fær leiklutin sum tann, sum situr við evstu ábyrgdini og tekur endaligu avgerðirnar.

Tað kemur kanska av, at hon er tann eldra av okkum báðum, og frá barnsbeini av er tað tí fallið henni í lut at samskipa og leggja til rættis. Leiklutirnir sum stórasystir og lítlasystir fylgja møguliga við langt inn í vaksnamannalívið.

**Rúna:** Eg kann ikki tola at spilla tíð orsakað av mistøkum, og tað er helst orsøkin til, at eg altíð skal leggja mínar ætlanir til rættis frammanundan. Uttan planlegging vassar ein skjótt út í trupulleikar, og tað er tað, eg royni at fyribyrgja.

**Mathea:** Ja, men tað er ofta tað spontana og óplanlagda, sum er stuttligt og spennandi.

**Rúna:** Mathea er sera disciplinер, nærløgd og professionell, og hon hevur harafturat nakað av tí spontana, sum eg ikki havi í eins stóran mun. Tá eg bíleggi eina flogbilett til Danmarkar og skal til Jylland, hyggi eg fyrst, nær tokini fara av høvuðsbanagarðinum, so allur túrurin passar, uttan at eg skal nýta tíð til at bíða. Mathea heldur hinvegin, at hetta er ein partur av upplivingini – tað at pláss er fyri tí óvæntaða.

Men munurin stavar møguliga frá barndóminum, tá eg var tann eldra av okkum báðum og hevði náttúrliga øðrvísi uppgávur enn Mathea.

*Hava tit báðar eitt tætt forhold?*

**Mathea:** Rúna er mín besti vinur. Eg havi 100% álit á henni, og um mær tørvar at tosa við onkran, vendi eg mær fyrst og fremst til Rúnu.

**Rúna:** Eg havi tað á júst sama hátt. Vit eru systrar, vinir, "sparringspartnarar" og alt møguligt annað.

*Hvat/hvør hevur havt størstan týdning fyri teir persónar, tit eru í dag?*

**Mathea:** Sum ein partur av míni cand. merc. útbúgving í Danmark valdi eg at fara á Harvard University í USA, har eg tók Master í samskifti og uttanríkishandli. Eg var heilt einfalt eitt annað menniskja, tá eg kom heim aftur. Tað, at eg kláraði lesnaðin, var so eitt, men samstundis fekk eg vinir úr øllum heiminum og lærdi eina ørgrynnu. Tað setti nógv í perspektiv og hevði stóra ávirkan á mítt lív. Tað lærdi meg millum annað, at ongar avmarkingar eru, um ein setur sær nakað fyri.

**Rúna:** Um eg skal nevna eina ávísa hending ella tíðarskeið, leitar mín hugur aftur til tíðarskeiðið, tá eg hevði trý lítil børn, var deildarstjóri á Mentamálaráðnum og tók mína næstu útbúgving sum fjarlesandi á

### Fakta um Rúnu

**Útbúgving:** Bygningsverkfrøðingur og MBA í leiðslu og vørumenning.
**Arbeiðsroyndir:** Undirvísari í støddfrøði á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, deildarstjóri á Mentamálaráðnum fyri vinnu- og miðnámsskúlar, sjálvstøðugt vinnurekandi bygningsverkfrøðingur, stjóri á Granskingarráðnum.